# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*»Hvat tað er, sum vit ynskja okkara børnum? Fyrst og fremst, so vilja vit hava, at tey skulu trívast«*

*Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari og nú eisini rithøvundur*

EM-Hondbóltur:

## Noreg í hálvfinaluna – Danmark úti

**Noreg vann enn ein sannførandi sigur, meðan Svøríki við sigri í síðsta dystinum kann tryggja sær atgongumerki til hálvfinaluna. Donsku kvinnurnar hava bert æruna at spæla fyri í síðsta dystinum eftir enn eitt tap**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Annað umfar í millumspælinum bar aftur okkurt óvæntað við sær, og nú kunnu vertirnar úr Svøríki tryggja sær pláss í hálvfinalunum við einum sigri í síðsta dystinum ímóti Fraklandi.

Bæði Noreg og Russland halda framvegis beinu kósini ímóti hálvfinalunum, meðan Týskland aftur vann. Eisini tær kunnu tryggja sær pláss í hálvfinalunum við sigri í síðsta dystinum.



*Madeleine Grundström hevur verið ein av heilt stóru leikarunum hjá Svøríki í kappingini. Aftur í gjár stóð hon ein branndyst, tá Svøríki vann á Spania, og nú hevur svenska liðið møguleikar at røkka hálvfinalunum.*

*Mynd: Polfoto*

### Eingin steðgar Noreg

Noreg hevur verið landið, sum hevur víst klárt besta spælið higartil í kappingini. Norsku leikararnir hava sett mótstøðuliðini uppá pláss eitt fyri og annað eftir, og í gjár var aftur klassamunur, tá Noreg møtti botnliðnum í fyrsta millumbólki, Makedonia.

Norski venjarin, Marit Breivik, kann ikki sigast at mangla sjálvsálit. Hon valdi nevniliga at byrja dystin við einum sokallaðum eykaliðið, tí eingin av leikarunum, sum vanliga byrja inni, vóru at finna í millum tær fyrstu sjey.

Fyrstu løtuna megnaði Makedonia eisini at fylgja væl við, og eftir fyrsta korterið stóð á jøvnum millum liðini. So valdi Noreg at gera nakrar útskiftingar, og so sást munurin í millum liðini. Tá liðini fór til hálvleiks var munurin heili 7 mál, og longu tá vóru ábendingar um enn ein stórsigur til Noreg. Í seinna hálvleiki helt Noreg fram við góða spælinum, og serliga vanligi eykamálverjin, Terese Pedersen, vísti stórspæl. Hon lat bara trý mál í gjøgnum í seinna hálvleiki, og at enda vunnu norsku kvinnurnar við 15 málum.

Í síðsta dystinum megnaði Týskland at vinna á einum av favorittunum, tá tær vunnu tryggan sigur á Ungarn. Nú møttu tær Eysturríki, og enn einaferð vísti Týskland klassan. Tær vunnu dystin við 12 málum, og stóri spælarin hjá Týsklandi var Sabine Englert, sum hevur verið ein av mest týdningarmiku hjá Týsklandi í hesum endaspælinum.

Í síðsta dystinum í bólkinum skuldi Ungarn royna at varðveita sín møguleika at spæla seg víðari til hálvfinalurnar. Tær møttu Póllandi, og her var eingin slingur í valsinum. Við Timea Toth á odda vann Ungarn ein knúsandi 16-mála sigur, og sostatt skulu tær vinna á Noreg í síðsta dystinum, samstundis sum Týskland tapir fyri Makedonia, um tær skulu hava nakran møguleika at koma víðari.

### Vertirnir kunnu røkka hálvfinalunum

Í seinna bólkinum lá Russland einsamalt á odda undan næsta dystinum í millumspælinum. Her møtti Russland Danmark, sum skuffandi tapti fyri Svøríki týskvøldi.. Russland var á odda at kalla allan dystin, og sjálvt um Danmark einaferð kom upp á javnleik og spældi ein góðan dyst, so megnaðu tær ikki veruliga at leypa hvøkk á russisku yvirmaktina. Russland vann dystin við fimm málum, og við sigrinum hevur russiska bjørnin tryggjað sær 1. plássi í bólkinum.

Tá millumspælið fór í gongd var Svøríki einasta landið uttan stig, men við sigri á Danmark týskvøldið høvdu tær ein lítlan møguleika at røkka semifinalunum, men so skuldi alt eisini ganga teirra veg. Í næsta dystinum møttu tær Spania, sum hevur verið eitt av størstu yvirraskilsunum í ár. Fyrstu løtuna var Spania oman á, men tá Svøríki fyrst fekk gongd á álopsspælið og ikki minst verjuspælið, so sá alt út til at rigga hjá teimum gulkløddu. Eftir javnleik í hálvleikinum eydnaðist Svøríki at vinna við fimm málum, og serliga Madeleine Grundström í málinum vísti stórspæl. Vinnur Svøríki síðsta dystin ímóti Fraklandi, so eru tær tryggjaðar pláss í hálvfinalunum.

Í síðsta dystinum møttus Frakland og Kroatia, og her eydnaðist Fraklandi at vinna við einum máli. Við sigrinum hevur Frakland enn eina lítla vón at røkka hálvfinalunum, meðan Kroatia ikki hevur nakran møguleika fyri víðari luttøku.

## Úrslit:

**Millumbólkur 1:**

| | |
|---|---|
| Makedonia – Norra | 13 – 28 |
| Eysturríki – Týskland | 22 – 34 |
| Ungar – Pólland | 37 – 21 |

**Millumbólkur 2:**

| | |
|---|---|
| Russland – Danmark | 32 – 27 |
| Svøríki – Spania | 24 – 19 |
| Kroatia – Frakland | 21 – 22 |

## Ársins ítróttar-avrik skal kjósast

**Útvarpið skipar nú fyri atkvøðugreiðslu, har lurtararnir millum fimm evni skulu kjósa besta føroyska ítróttaravrikið í 2006**

Tey fimm, sum veljast kann ímillum, eru nominerað, eftir at eitt panel við trimum ítróttarblaðmonnum hevur gjørt sær sínar tankar um ítróttarárið.

Teir tríggir, Finnur Helmsdal, Jákup Mørk og Terji Nielsen, høvdu hvør í sínum lagi grundgivið fyri fimm nøvnum, sum teir hildu áttu heiðurin uppiborinan, og sum so var rímiliga breið semja um, hvørji hesi fimm nøvnini skuldu verða. Í alt vórðu nevnliga sjey nøvn á listanum, sum telur hesi fimm: Helgi Dam Ziska (talv), Elspa Mørkøre (svimjing), Katrin Olsen (róður), Heidi Andreasen (svimjing) og B36 (fótbóltur).

Hesi fimm hevði Finnur Helmsdal øll í uppskoti. Terji Nielsen og Jákup Mørk høvdu hvør sítt navn á listanum, sum tó ikki kom við. Tey bæði nøvnini vóru Niclas Eysturoy (badminton) og HB (fótbóltur)

Atkvøðugreiðslan um heitið sum ársins ítróttaravrik fer fram á heimasíðu Útvarpsins, www.uf.fo, og byrjar hon í dag.



*Helgi Dam Ziska fekk flestu stigini frá panelinum, sum valdi tey fimm bestu ítróttaravrikini í 2006*

**EM-Hondbóltur, millumrunda**

| Bólkur 1 | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Noreg | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 126 | 80 | 46 | 8 |
| 2 Týskland | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 120 | 96 | 24 | 6 |
| 3 Ungarn | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 136 | 100 | 36 | 6 |
| 4 Póland | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 97 | 132 | -35 | 2 |
| 5 Eysturríki | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 97 | 140 | -43 | 2 |
| 6 Makedonia | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 93 | 121 | -28 | 0 |

| Bólkur 2 | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Russland | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 114 | 88 | 26 | 8 |
| 2 Svøríki | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 86 | 92 | -6 | 4 |
| 3 Spania | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 100 | 102 | -2 | 4 |
| 4 Frakland | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 94 | 94 | 0 | 4 |
| 5 Kroatia | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 91 | 98 | -7 | 2 |
| 6 Danmark | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 96 | 107 | -11 | 2 |